# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Lona Johansen talar.
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og meinigheitsfundur kl. 18. Jan Johannesen talar. Evni: »Tað er fullgjørt«. Barnaansing. Innsavnan til húsið. Hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
Sunnudagin: 1.4.2007 Breyðbróting og Læra kl. 11.
Evangeliskt møti um kvøldið kl. 18.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Børnini Møtast:
Børnini møtast kl. 11 í kjallaranum í KEDRON, har øll børn eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14. Møti við barnaansing verður kl. 18 við Onnu og Marna, Lovinda syngur. Drekka verður aftaná. Mánakvøldið kl. 20 verður bíbliutími. Sonni tosar um Jesaja.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin 1/4 morgunmøti við breyðbróting klokkan 11.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14. Møti verður kl. 18.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við ungdómi úr Lívsins Orð.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Malmberg D. Olsen.
Sangluttøka við Oasubrøðrunum
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið 30. mars kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin 1. apríl kl. 11 Barnagudstænasta verður í kirkjuni kl. 11. Eingin sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/Olgu og Tórfríða Magnussen.
Øll eru hjartaliga væl komin

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.17.00 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Talari verður Heri Kjærbo. Evni: illir andar Hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.

**Rituvíkar Missiónshús**
Sunnudag kl. 16 Familjumøti v/ Jastrid Gregersen.
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 3. apríl kl. 19. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við André Matras.
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14 er møti.
Sunnudagsskúli er undir møtinum.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Pálmasunnudag onki møti.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Kfum og Kfuk Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl.17.30 Bønarmøti.
Kl. 18 Møti við Eyðbjørn Jacobsen. Kórið syngur.
Kl. 21 ungdómsmøti.
Mánakv. kl. 20 møtist sjómanskvinnuringurin.

**Møti verður i Kunoyar kirkju**
leygarkvøldið 31. mars kl. 19.30, Regin Høgnesen trúboðari talar og streingjakórið úr KFUM&K syngur. Innsavnan verður til Heimasmissiónina.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 14 verður barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 verður morgunmøti v/Ásbjørn Kjærbo.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli og einki møti vegna konfirmatión.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið 30. mars verður ungdómstreff í Missiónshúsinum á Tvøroyri kl. 22.
Leygarkvøldið 31. mars verður ungdómsmøti kl. 21 í Missiónshúsinum í Porkeri.
Bæði kvøldini við luttøku norðanfjørðs. Øll eru hjartaliga vælkomin!
Vegna konfirmatión verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin. Sunnukvøldið verður møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Loytn. Ragnar Ludvig talar um evnið »Tað kostar at vera lærusveinur.«
Kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Evangeliskt møti við Kristmund Steinkross og Hallur Ludvig. Evnið er »Eitt lív í Kristi Jesusi.«
www.frelsunarherurin.fo

**Bethel, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Øll eru vælkomin.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn, gongutúr**
Sunnudagin 1. apríl verður gongutúrur: Eggjaklettur - Borðan. Farið verður av Bursatanga kl. 9.30 við Rituni. Minst til at hava góð og hóskandi gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Heilafelagið**
Skrivstovan er opin hvønn mikudag frá kl. 19-20.
*MBF-húsið kjallarin Inngongd frá Landavegnum Tlf. 321520.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 2. apríl***
kl. 10-10.30 Páskafimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl og onnur spøl
***Týsdagin 3. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Simme Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
***Mikudagin 4. apríl***
kl. 10-13.30 ***Ongin matgerð áðrenn páskir***
kl. 10-12 Tóvirkið. (Veving, maskinbinding, seyming, binding o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin. ***Ása, Katrin, Margit og Marita***
kl. 14-17 Onki telduprát
kl. 15 ***»Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti stundisliga.*** Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagin 5. apríl***
***Skírhósdagur***
***Fríggjadagin 30. mars***
***Langi fríggjadagur.*** Vit ynskja øllum eini gleðiligar páskir.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.

**Sunda Pensionistafelag**
Hugnakvøld verður mánakvøldið 2. apríl kl. 19 í Eydnuni á Oyrarbakka.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 13***
***Mánadagur 26. mars.***
Fimleikur. Felagssangur.
***Týsdagur 27. mars.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Mikudagur 28. mars.***
Boccia.
***Hósdagur 29. mars.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur 30. mars.***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin

**Prógv**
22. januar 2007 hevur Sanna í Túni Nielsen, Toftir, lokið prógv sum Kemiingeniør á Danmarks Tekniske Universitet í Lyngby.

Durita Lamhauge Jóansdóttir, Tórshavn, hevur við Aarhus Universitet lokið prógv sum cand. mag. í Evropavísindum og Fjøðmiðlafrøði. Hon hevur í sambandi við útbúgvingina eisini verið gestalesandi á Fróðskaparsetri Føroya og á Universitetinum í Bremen, Týsklandi.

**50 ár**
17. apríl fyllur Harry Benjaminsen, Toftir, 50 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði 20. apríl kl. 19. Tey, við vilja gleða meg við at koma í føðingardag vinarliga sigið frá á tlf. 448139 ella 218139 áðrenn 15. apríl.

**Brúdleyp**
Mánadagin 2. apríl giftst í St. Johns kirkju í Cairo, Karin A. Dahl og Kenneth M. W. Jacobsen.

Mikudagin 4. apríl 2007 giftast í Tórshavn Borgarhjørt Kragesteen úr Tórshavn og Hans Mortensen av Argjum, búsitandi á Argjum. Dagurin verður hildin fyri innbodnum um kvøldið í hølum Starvsmannafelagsins.

14. apríl kl. 15.00 giftast á sýsluskrivstovuni á Ìsafjørðinum í Íslandi Elzbieta Blazejczak og Sniálvur Røvilsberg. Brúdleypsadr.: Hjallarvegur 9, Íbúð 104, 425 Flateyri.

Leygardagin 31. mars kl. 13.00 giftast í Vesturkirkjuni Jórun S. Ludvig, Tórshavn og Jóan Pauli Vilhelmsen, Vestmanna. Opið hús verður í HB húsinum millum kl. 14.00 -17.00. Øll eru vælkomin.

**Silvurbrúðleyp**
Mánadagin 11. juni 2007 hava Gunnvør og Petur Thomsen, Madumsøvej 4, Hellum, 920 Skørping silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 23. juni kl. 18. í Veddum forsamlingshus. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg áðrenn 1. mai 2007 á tlf. 0045 98398339.




Mánadagin 2. apríl hava Herfrí og Jógvan Andrias Sørensen, Mikladalur, silvurbrúdleyp, opið hús verður í Avhaldshúsinum í Mikladali, frá kl. 18.00.

Páskaaftan 7. apríl hava Anna og Magnus Skýlindal silvurbrúdleyp, tey ið ynskja at gleða okkum henda dagin, eru vælkomin í heimið millum kl. 12 og 18.

Týsdagin 1. mai hava Dorit og Egin Simonsen í Sørvági, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 05. mai í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 333072, 213755, 213072, ella e-mail egins@post.olivant.fo innan 16 apríl.

Týsdagin 8. mai 2007 hava Torlakkur og Jonna Hansen, Nólsoy, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 12. mai í bygdarhúsinum í Nólsoy, frá kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 327111 ella 227111 áðrenn 20. apríl.